# Pólskir læknar styrkja Klaksvíkar Sjúkrahús



**Klaksvíkar Sjúkrahús hevur brynjað seg út við tveimum pólskum skurðlæknum, sum nú arbeiða fast á sjúkrahúsinum. Áður hava skiftandi avloysarar verið skurðlæknar, men nú starvast Boguslaw Koszman og Cezariusz Zawal fast á sjúkrahúsinum í Norðoyggjum**

LÆKNAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Teir funnu til Klaksvíkar umvegis lýsingar eftir læknum í Póllandi, sum vildu koma til Danmarkar ella Føroya at arbeiða.

Endin var, at teir báðir komu at royna arbeiðið í Klaksvík, og eftir at hava verið í Klaksvík eina tíð og eisini verið á málskeiði í Danmark, eru Boguslaw Koszman og Cezariusz Zawal nú komnir aftur at arbeiða fast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

– Vit hava størri sjúkrahús í Póllandi, og áðrenn eg kom til Føroya, arbeiddi eg í einum býi við 80.000 fólkum. Hetta er ein minni býur og eitt minni sjúkrahús, men tað er sera væl útgjørt, og umstøðurnar eru sera góðar at arbeiða her, sigur Cezariusz Zawal.



*– Í Føroyum eru umstøðurnar á sjúkrahúsinum betur. Her er øll neyðug útgerð og annars alt tað, sum vit hava brúk fyri. Í Póllandi kanst tú framvegis koma út fyri, at tú ikki ført alt tað, sum tú skalt brúka, sigur teir báðir pólsku læknarnir*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Cezar og Boguslaw gera klárt til eina minni skurðviðgerð. Teir eru báðir royndir skurðlæknar og eru eisini góðir til ymsar kikarakanningar. Teir hava eisini starvast innan ambulansatænastu, har teir eru farnir út til smærri og størri skaðar*

*Mynd: Bárður Lydersen*

## Svaraðu lýsingum

Teir báðir pólsku læknarnir kendu ikki hvønn annan, áðrenn teir komu til Føroya at arbeiða.

– Vit hava arbeitt í sama øki, men orsøkin til, at júst vit báðir komu til Klaksvíkar var, at vit svaraðu báðir lýsingini eftir læknum til Danmark og Føroya, sigur Boguslaw Koszman.

Teir eru báðir útbúnir á pólskum universiteti og eru royndir skurðlæknar. Teir hava eisini nógvir royndir í at gera kikarakanningar, og so hava báðir arbeitt eitt skifti í ambulansatænastu, har teir eru farnir út til størri og smærri skaðar.

Heri Ellingsgaard, sjúkrahúsleiðari, sigur, at teir báðir pólsku læknarnir styrkja Klaksvíkar Sjúkrahús.

– Læknamanningin er styrkt, og hetta gevur øktar møguleikar fyri viðgerð á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, nú Norðoyatunnilin er á veg, sigur hann.

## Betur útgjørt enn í Póllandi

Teir báðir blíðsníðaðu læknarnir tykjast trívast væl á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hvørgin teirra tosar føroyskt, men báðir hava verið á málskeiði í Danmark. Boguslaw roynir seg á donskum, meðan Cezar heldur seg til tað enska.

– Vit fáa góða hjálp frá hinum starvsfólkunum á sjúkrahúsinum, um tað eru trupulleikar við málinum. Vit eru sera væl móttiknir og kenna okkum væl her, sigur Cezar.

– Hetta er eitt væl útgjørt sjúkrahús við góðum og kvalifiseraðum starvsfólki, heldur Boguslaw.

Teir halda ein steðg eina løtu, meðan teir bíðað eftir, at tað verður gjørt klárt til næstu skurðviðgerðina.

– Starvið her á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er ein spennandi avbjóðing fyri okkum, tí arbeiðið er meira fjølbroytt, enn tað var í Póllandi, tá ið vit høvdu serligar uppgávur at taka okkum av, sigur Cezar Zawal.

– Í Føroyum eru umstøðurnar á sjúkrahúsinum betur. Her er øll neyðug útgerð og annars alt tað, sum vit hava brúk fyri. Vit mangla ikki heiligvág ella nakað annað. Í Póllandi kanst tú